

# Analytikari til FØROYABANKI Corporate Finance

## Vit søkja eftir analytikara til Corporate Finance deildina hjá Føroya Banka

Føroya Banki økir støðugt um sítt virksemi og søkir tí nýggj fólk til Corporate Finance deildina.

Fyri starvið er galdandi, at tú fært eina breiða viðberaflatu viðvíkjandi fíggjarligum spurningum innan corporate finance/investment banking.
Arbeitt verður verkætlanargrundað og saman við royndum starvsfeløgum skalt tú eitt nú ráðgeva um keyp og sølur av fyritøkum, samanleggingar og virkisfíggingar.

Sum analytikari í Corporate Finance deildini, verða tínar arbeiðsuppgávur m.a.:

- Fíggjarligar greiningar av fyritøkum og virkisøkjum
- Ger av virðismetingum
- Uppstilling av fíggingarbygnaðum í sambandi við yvirtøku av fyritøkum, umfíggingar, o.l.
- Ger av framløgum til eitt nú íleggjarar, virkisleiðarar og -eigarar.

**Um teg:**

- Tú hevur eina longri búskaparliga útbúgving, sum eitt nú cand. merc., cand. polit., ella HD í fígging ella roknskapi.
- Tú ert ástøðiliga væl fyri, er framsøkin og hevur góðar samstarvseginleikar.
- Tað er ynskiligt, at tú hevur 1 - 2 ára royndir innan fíggjarheimin, kanska úr einum øðrum fíggjarstovni, einum grannskoðanarvirki ella konsulentvirki.
- Nýútbúnir umsøkjarir við góðum próvúrslitum verða eisini eggjaðir at søkja.
- Tú skal hava gott analytiskt skil og skipað miðvíst arbeiðslag.
- Tú skal kunnað veita ágrýtið og virðismikið ískoyti til arbeiðstilgongdina, eisini undir trýsti.
- Tú skal eisini hava nágreindan kunnleika til virkisanalysur, mannagongdir og myndlar viðvíkjandi virðismetingum.

**Um Føroya Banka og Corporate Finance deildina:**
Føroya Banki stendur fyri nógvum spennandi avbjóðingum. Einskiljingartilgongdin er komin væl ávegis og bankin hevur lagt eina framsøkna vakstrarstrategi fyri framtíðina.

Corporate Finance deildin byrjaði sítt virksemi á heysti 2006 og í løtuni starvast tvey fólk á deildini. Umframt at ráðgeva í sambandi við keyp og sølu av fyritøkum veitir Corporate Finance deildin ráðgeving til kundar sínar í sambandi við at fáa til vega kapital til t.d. at keypa fyritøkur og at virðismeta alla ella partar av fyritøkuni í sambandi við sølu ella umskipan.

**Meira at vita:**
Um tú ynskir at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til John Rajani, leiðara fyri Corporate Finance deildini, á telefon +298 517099 ella um teldupost á teldupostadressu: **jr@foroya.fo**. Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum, ævilýsing og ummælum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 28. mai. Umsóknin skal sendast til:

**P/F Føroya Banki**
Starvsfólkadeildin
Húsagøta 3
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

STARVSLÝSING

Umsóknarfreist
24. MAI




# Sølufólk til innflutningsdeildina

**Starvið**
Talan er um eitt spennandi og avbjóðandi starv í eini altjóða flutningsfyritøku, har tú saman við trimum øðrum sølufólkum verður við til at menna søluna og fært ábyrgd av sølu av innflutningi og produktum okkara.

**Førleikakrøv**
Tú ert fyrikomandi og áheitin, arbeiðir bæði sjálvstøðugt og saman við øðrum, og tú skrivar og talar føroyskt, skandinaviskt og enskt. Tað er avgjørt ein fyrimunur, um tú hevur útbúgving og starvsroyndir, men hetta er ikki nøkur treyt.

**Lønarviðurskifti og umsóknir**
Lønin verður ásett í samsvari við førleikar og royndir. Umsóknir við møguligum prógvum og skjølum um starvsroyndir skulu sendast til Faroe Ship, Eystara Bryggja, Postboks 47, FO-110 Tórshavn í seinasta lagi 24. mai 2007. Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Rene Dahl Olesen, 23 90 33, renedo@faroeship.fo.

FAROE SHIP
Góð sambond síðan 1919

Faroe Ship er flutningsfyritøka, sum saman við Eimskipafelag Íslands síðan 1. juli 2004 hevur myndað altjóða fyritøkuna Eimskip Group, ið er størsta flutningsfelag í Norðuratlanshavi, við egnum rutum til Evropa, USA, Baltalond og Ruslands.

Virkisøkið hjá Faroe Ship er innflutningur, útflutningur, innlendiskoyring, agency, vøruhotell og skundflutningsfyritøkan Faroe Express. Faroe Ship eigur fimm skip og hevur um 200 fólk í starvi. Í 2006 umsetti Faroe Ship fyri 300 milliónir krónur.

# HH-húgvurnar frá '94

**Tann 16. juni** hittast vit øll somul í Hornahúsunum í Havn. Reyp um skúladagar, prát, sangur og hugni verða á skránni, og so er bara at taka góða lagið við.

Tilmeldingar til veitsluna fer fram við at senda teldubræv til klassaball@sosialurin.fo

**Kostnaður 400 kr.**

